# Skaðilig evni í vátserviettum

**Av 13 kannaðum vátserviettunum, eru bert 5, sum ikki innihalda evnafrøðilig evni, ið kunnu vera heilsuskaðilig, vísir nýggj kanning frá danska umhvørvis- og heilsustovninum, IMS.**

KANNING

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

8 av 13 ymiskum merkjum av vátserviettunum, sum verða nýttir til at vaska pinkubørnum við, innihalda heilsuskaðilig evni og luktilsi, sum kunnu elva til ovurviðkvæmi (allergi). Hetta vísti ein kanning, sum danski stovnurin Miljømærkesekretariatet almannakunngjørdi 26. januar 2006. Stovnurin segði tó einki um, hvørjar vørur talan ítøkiliga var um.

Tí hevur kunningarstovnurin Informationscenter for Miljø & Sundhed verið til handils, og stovnurin hevur valt at almannakunngera nøvnini og úrslitini av kannaðu vátserviettunum.

– Á einum av teimum kannaðu serviettpakkunum stendur, at teir eru við ongum anga, ella luktilsi, og kortini vísir tað seg, at teir eru við luktilsi, siger Rikke Petersen, sum er umhvørvis- og heilsufakligt starvsfólk hjá IMS.

– Vanliga ráða fólki frá at nýta vørur við luktilsi til børn, samstundis sum tað er skilagott at halda aftur við haldevnum, sum kunnu geva ovurviðkvæmi, siger Rikke Petersen. Hon leggur tó dent á, at talan í øllum førunum er um góðkend evni, sum ikki eru bannað at nýta í vanligar vørur til húðrøkt og smyrsl.

– Listin er ætlaður at vera ein hjálp til brúkarar, sum ynskja at verja børnunum ímóti evnum, sum eru undir illgruna fyri at kunna elva til ovurviðkvæmi. Við listanum ber til at velja teir serviettarnar frá, sum kunnu vera heilsuskaðiligir, siger Rikke Petersen.

## Listin yvir serviettar, sum *ikki* hava evni, ið kunnu vera heilsuskaðilig


Baby Mini Risk Vådservietter


Baby' O Vådservietter


Pigeon baby wipes fra Apoteket


COOP Soft & Mild


Vaskeservietter fra Matas

## Listin yvir serviettar, som hava evni, ið kunnu vera heilsuskaðilig


HUGGIES Wipes Pure gentle cleaning


Natusan Baby Wipes vaskeservietter gentle care


Natusan Extra Care vaskeservietter best ever protection


Natusan Baby Wipes vaskeservietter parfume free


Pampers sensitive


Pusletid vådservietter


Vibelle Babyservietter


Unique vådservietter uden parfume

## FAKTA

**Góð ráð**

– Brúka vatn og lappa og møguliga eitt lítið sindur av sápu í staðin fyri vátserviettar

– Nýt bara vátservietter som eina neyðloysn

– Tak ein vátan lappa ella eingangslappa við í einum lítlum posa, tá tit fara túr

– Sápa er sum oftast bara neyðug, tá barnið hevur kukkað. Brúka tá eina milda barnasápu við ongum luktilsi

– Brúka ongantíð vátserviettar í andlitinum, tí teir kunnu innihalda iodopropynylbutylcarbamat, sum eru evni, ið ikki mugu koma í samband við munnin.

Kelda: www.miljoeogsundhed.dk



TOYOTA COROLLA 1,9 DIESEL TERRA STW — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: UR 668 KM: 65.000
Árgangur: 29.11.00 Seinast sýnaður: 11.11.05
Útgjald kr. 33.460,- Kr. 95.000,-


LEXUS IS 200 COMFORT AUT. GEAR — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: HJ 590 KM: 53.000
Árgangur: 14.08.02 Seinast sýnaður: 14.08.02
Viðmerkingar: Klimaanlegg - Radio/CD til 6 fløgur - Fjarstýrt sentrallás - Fartpilot - Alufelgur - Elrútar o.m.a.
Útgjald kr. 82.380,- Kr. 274.000,-


TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: UG 319 KM: 128.000
Árgangur: 15.09.99 Seinast sýnaður: 12.01.05
Viðmerkingar: Fjarstýrt sentrallás · Radio/CD · Elrútar framman
Útgjald kr. 35.440,- Kr. 88.000,-


TOYOTA COROLLA 2.0 DIESEL
Skrásetingarnr.: HM 041 KM: 215.000
Árgangur: 19.05.99 Seinast sýnaður: 05.08.04
Útgjald kr. 25.040,- Kr. 62.000,-


TOYOTA AVENSIS 2,0 DIESEL D4-D TERRA — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: UN 025 KM: 126.000
Árgangur: 28.06.00 Seinast sýnaður: 17.11.05
Útgjald kr. 38.710,- Kr. 110.000,-


HYUNDAI COUPE 2,0 — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: JR 700 KM: 58.000
Árgangur: 13.07.00 Seinast sýnaður: 01.02.04
Útgjald kr. 33.110,- Kr. 94.000,-


TOYOTA COROLLA H/B 1.3 I
Skrásetingarnr.: DU 068 KM: 184.000
Árgangur: 29.03.95 Seinast sýnaður: 01.12.05
Kr. 32.000,-


MAZDA 323 2,0 D
Skrásetingarnr.: JK 233 KM: 104.000
Árgangur: 03.12.99 Seinast sýnaður: 14.04.05
Útgjald kr. 31.440,- Kr. 78.000,-


TOYOTA AVENSIS 2,0 TD SOL — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: KP 422 KM: 203.000
Árgangur: 13.10.99 Seinast sýnaður: 26.07.05
Viðmerkingar: Fjarstýrt sentrallás - Elrútar A+F - Radio/CD
Útgjald kr. 38.240,- Kr. 95.000,-


FORD FOCUS 1,6 V/MVG — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: FN 646 KM: 47.000
Árgangur: 24.04.01 Seinast sýnaður: 01.06.05
Útgjald kr. 38.710,- Kr. 110.000,-

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo
REYNI SERVICE P/F

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.